# Starvsfólkini hjá Shell fylla á




Føroya Shell lýsa við at frá mánadegnum 4. til og við fríggjadagin 8. februar taka starvsfólk teirra sær av at fylla bensin og olju á bilarnar. Hetta er galdandi fyri báðar Shell-støðirnar í Havn og tær í Gøtudali og Klaksvík.

Leif Hovgaard, retail manager hjá Føroya Shell, sigur, at átakið er ein liður í at kundarnir skulu merkja, at Føroya Shell gevur teimum eina enn betur tænastu í 2008,

Saman við áfyllingini hava støðirnar nógv onnur góð tilboð í handlunum.

Hetta átakið er bert startskotið. Ætlanin er at koma við fleiri spennandi tilboðum til kundarnar í hesum árinum.

Fyrr høvdu allar støðirnar, fólk til at fylla olju og bensin á bilarnar. Leif Hovgaard sigur, at teir hava ongar ætlanir um at byrja við tí aftur.

mg




